# Fugltúgvan verður longd á Tórshavnar Skipasmiðju

**Á Tórshavnar Skipasmiðju eru teir í holt við at leingja línubátin, Fugltúgvuna, sum eisini fær nýggjar slengrikjølar og nýggjan stabiliseringstanga**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin,.fo*

Ein sektión, sum er 6,60 metrar, verður sett upp í skipið, sum við leingjanini verður stívliga 34 metrar langt.

Breiddin á Fugltúgvuni er 7,50 metrar.

Skipið fær eisini nýggjar slengrikjølar, sum er dupultir, heilir í niðara parti og við holum í ovara parti.

**Roynast væl**

Gunnar Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, sigur, at hetta slagið av slengrikjølum hevur víst seg at roynast sera væl.

– Eg eri ikki heilt greiður yvir, hvaðani henda skipanin stavar. Men hetta er gomul vitan, sum vit fyrstu ferð sóu í Føroyum fyri eini 10 árum síðan. Á Tórshavnar Skipasmiðju hava vit bygt hesar kjølar í eini 5-6 ár, sigur hann.

**Betri stabilitet**

Aftrat leingjanini og nýggju slengrikjølunum, fær Fugltúgvan eisini nýggjan stabiliseringstanga – ella rullidoyvitanga, sum tað verður rópt á føroyskum. Hesin verður bygdur oman á dekkinum frammanvert brúnna.

Fugltúgvan verður eisini málað umframt at onnur smáarbeiði verða gjørd umborð, meðan skipið stendur á Tórshavnar Skipasmiðju.

**3 mió krónur**

Gunnar Mohr sigur, at leingjanini, slengrikjølar, stabiliseringstangi og tað, sum annars verður gjørt við skipið, nú tað stendur á beddingini, fer at taka fimm vikur tilsamans.

Kostnaðurin fer at liggja um 3 mió krónur.

Tað eru klaksvíkingar, ið eiga felagið P/F Torvanes, sum eigur Fugltúgvuna.

Skipið, sum í fleiri ár var heimahoyrandi á Eiði, er bygt í Strandby í Danmark í 1988.



*Fugltúgvan verður longd við 6,60 metrum. Haraftrat fær skipið nýggjar slengrikjølar og nýggjan stabiliseringstanga*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Rimmar piparbússa

**Tað er ikki bara sum at siga tað at fylla 30 - og ikki vera trúlovaður, ei heldur giftur. Tað mátti ein ungur maður í Havn sanna mánamorgunin**

PIPAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta man vera ein tann størsta piparbússan, sum er reist yvir ein ungan mann, sum fyllir 30 - og enn ikki er vorðin giftur!

Piparbússan, sum stóð reist í Eysturbýnum í gjáramorgunin, er einki minni enn ein stór bingja, sum er sett uppeftir enda.

Vit fingu eitt ”hint” um bússuna og fóru ein túr á staðið.

Um hon røkkur einum guinnes-meti, vita vit ikki, men stór er hon, má sigast.

Sum skilst, reistu vinmenninir hjá tí, sum fylti 30, hesa velduga stóru piparbússu við einum stórum kranabili.

Tað kann vera, at Rana vantar konufólk, nú hann er farin um tey 30, men pipar vantar honum í hvussu er ikki tey næstu 30 árini!



*Guð viti, hvat tað næsta verður, mundi onkur hugsa, tá ið tey komu framvið hesi velduga stóru piparbússuni í Eysturbýnum í Havn í gjáramorgunin. Her er í hvussu er nógv pláss til pipar*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Móttøka



60 ár

Í sambandi við at liðin eru 60 ár, síðan elfelagið SEV var stovnað, verður almenn móttøka á skrivstovu felagsins á Landavegi 92, Tórshavn,
fríggjadagin, 29. september 2006 frá kl. 15-17

REPROZ

SEV